Havn 2/3-2017

**Frágreiðing frá tilmælisnevndini, sum tilnevnir føroyska uppskotið til Norðurlendsku bókmentavirðislønina**

Aftur á hesum sinni var tað fráfarni formaðurin, Ann Ellefsen, sum luttók á Norðurlandafundi, har okkara uppskot, *Eg síggi teg betur í myrkri* hjá Carl Jóhan Jensen varð presenterað saman við øllum hinum innstillingunum. Tað endaði sum kunnugt við, at framúrskarandi yrkingasavnið Sånger och formler hjá svenska yrkjaranum Katarina~Frostenson vann bókmentavirðislønina fyri 2016.

Síðan hava vit í nevndini havt fundir og endaðu við at tilnevna yrkingasavnið hjá Sissal Kampmann *Sunnudagsland* til Norðurlendsku bókmentavirðislønina 2017. *Sunnudagsland,* ið er fimta útgávan hjá Sissal Kampmann, er eitt savn av yrkingum til heimstaðin, Vestmanna. *Sunnudagsland* er eitt búgvið yrkingasavn, ið er komponerað sum ein heild við yrkingum um eitt yrkjaraeg, sum er flutt aftur til heimbygdina at vera eina tíð. Vit hóma samfelagið, men uppliva ikki onnur fólk í bókini enn yrkjaraegið, ið tykist avbyrgt í lufttómum rúmi. *Sunnudagsland* er ein sorgblíð bók, merkt av longsli og eini djúpari kenslu av fremmandleika og av at vera uttanfyri. Tíðin, tað slitna umhvørvið og tað vánaliga veðrið verða nágreiniliga skrásett av yrkjaraegnum, sum kannar veðurlíkindini fleiri ferð um dagin. Veðrið og ljósið hava sera stóran týdning í savninum. Orðið sunnudagur ella sunnudagr merkir sóldagur, men eftir øllum at døma mugu tey bíða eftir sólini í Sunnudagslandinum, har ódn og myrkur ráða, har klokkan ringir ljóðleyst og har vegurin til bygdina er sólleysur og stjørnuleysur.

Eitt sindur av broyting er nú komið í við tað, at Ann Ellefsen hevur lagt frá sær eftir drúgva tænastu í tilmælisnevndini. Nú eru vit í nevndini: Kinna Poulsen, formaður. Bergur Djurhuus Hansen. Tiltakslimur: Marianna Hoydal

vh Kinna Poulsen